tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Norsk - føroysk samvinna í framtíðini

## *Oddagrein*

HETTA er tann tíðin, tá ferðafólkini byrja at koma til Føroya. Norrøna er júst farin undir summarsiglingina, og Atlantsflog er farið og fer undir fleiri av sínum týðandi rutum, eitt nú til Aberdeen og Stavanger. Hetta er eisini tann tíðin, tá útlendskir sendiharrar í Danmark banka upp á dyrnar og vilja hitta fólk, sum teirra land hevur brúk fyri at hava góð viðurskifti við.

HERFYRI vitjaði nýggi bretski sendiharrin í Danmark, og mánadagin kom nýggi norski sendiharrin í Danmark til Føroya. At nettupp tvey av næstu grannalondum okkara og tvey lond, sum vit hava og helst fara at fáa enn betri samband og samvinnu við, hava fingið nýggjar sendimenn í Danmark - og sum eisini hava Føroyar sum sítt ábyrgdarøki - leggja leiðina til Føroya nærum um sama mundið er kanska eitt positivt tekin. Nú um dagarnar úttalaði býráðsformaðurin í Havn seg um nettupp samvinnu okkara við tveir týðandi samstarvsbýir í Skotlandi og Noregi. Eingin ivi er um í okkara verð, at Stórabretland og Noreg verða tvey lond, sum vit føroyingar fara at hava nógv meira samstarv við í framtíðini, ikki minst vegna góða sjóvegis og loftvegis sambandið. Henda samvinna okkara, sum longu er, kann mennast munandi tað verið seg innan fiskivinnu, ídnað, aling, tøkni, oljuvinnu og eisini ferðavinnu. Ynskið og økti áhugurin frá bæði okkum og grannum okkara at fáa størri samvinnu kundi so eisini verið ein góður møguleiki hjá nýggja ferðavinnustjóranum at fylgt upp. Bøtta ferðasambandið skuldi verið ein so upplagdur tjansur fyri at fáa fleiri norðmenn, bretar og skotar henda vegin at ferðast. Tað er eisini nakað, sum nýggi norski sendiharrin í Danmark eigur at hava í huganum, nú hann og konan síggja og uppliva vakra land okkara.

UMFRAMT at menna samvinnuna á økjum vit longu samvinna á, so eiga vit eisini at seta skjøtil á samvinnuna á tí nýggja vinnuøkinum, sum fevnir um oljuna og tí harvið fylgir. Tí er tað eisini áhugavert at merkja sær, at sendiharrarnir í tveimum av fremstu oljulondunum um okkara leiðir, vitja og tað nettupp í eini tíð, har føroyingar eru við at seta spónin í. Tað skal vera vón okkara, at norsku sendiharrahjúnini kenna seg væl í Føroyum, og at tey koyra fingurin í jørðina og vita, hvussu føroyingar og norðmenn best kunnu samvinna á oljuøkinum. Undanmaður Dagfinn Stenseths, Thorvald Stoltenberg var í Føroyum fyri tveimum árum síðani, og tá legði hann upp til, at man frá norskari síðu vildi taka initiativ til eitt samstarv á oljuøkinum. Hetta sama hava bæði undanfarni forsætisráðharrin og nú eisini sonur hansara í hesum embæti sagt seg fúsar til. Áhugavert hevði verið, um norski sendiharrin hevði kunnað fylgt hesum upp og komið við nøkrum ítøkiligum uppskotum um, hvussu norska oljutjóðin kann geva sítt íkast til, at føroyingar fáa eina oljuvinnu, sum gagnar hesum samfelagnum sum frægast. Meðan bretar hava sagt seg vilja hjálpa við fysiska karminum kring loyvisgeving til oljuleiting, kundu norðmenn kanska hjálpt føroyingum at minka um teir negativu avleiðingarnar oljumenningin kann hava á eitt lítið og viðkvæmt samfelag. Thorvald Stoltenberg hevði stórar vissiónir um hesa samvinnu, men hann fekk aðrar altjóða uppgávur, sum forðaðu honum í at gera tær til veruleika. Nú hevur eftirmaðurin møguleikan at taka um endan, har Stoltenberg slepti og gera orð hansara til veruleika. Báðum londum til gagns. Dagfinn Stenseth skal vera vælkomin til at byggja brýr millum Føroyar og Noreg.

*Sosialurin*

# Fuglafjarðar gentukór hevur kirkjukonsert



Kirkjukonsert verður fríggjakvøldið 26. mai í Fuglafjarðar kirkju kl 20:30. Tað er Fuglafjarðar gentukór, ið fer at syngja.

Í august fer kórið til Aalborg og Skagen á konsertferð. Kórið fer at vitja ungdómskórið í Skalborgs kirkju, sum var og vitjaði í Fuglafirði fyri trimum árum síðani.

Kórleiðari er Frits Johannesen, orgulfylgisspælið hevur Heðin Kambsdal, og klaverfylgisspælið hevur Eyðun á Lakjuni.

# Bragi - eitt tíðarrit fyri bók og mentan




Nú fæst onnur útgáva av mentanarritinum Braga í leysasølu fyri 76 kr. eintakið. Tað fæst til keyps eitt nú í H. N. Jacobsens Bókahandli, í Bókasøluni í SMS, í Horninum í SMS og í Alfa Bókahandli í Klaksvík.

Bragi inniheldur bókmentaligt tilfar og hesaferð eisini tilfar um myndlist. Harumframt verður tann nýggjasti skaldskapurin í Føroyum umvældur, meðan føroysk mentanarviðurskifti í breiðum týdningi eisini verða viðgjørd í blaðnum. Føroyskir útisetar geva blaðið út.

Ætlanin við Braga er, at blaðið skal vera ein miðil, sum vendir sær til ein breiðan lesaraskara til kunningar um tað týdningarmesta, sum hendir á føroyska mentanarpallinum. Tað inniheldur ummæli og greinar skrivaðar av føroyingum, sum dagliga fáast við mentan og bókmentir, og er sostatt staðið, har ymisk sjónarmið kunnu roynast og sammetast við onnur. Bragi roynir bæði at finna tað serstaka í mentan okkara, og at seta serføroysku mentanarfyribrigdini inn í eina størri, norðurlendska evropeiska heild.

Onnur útgáva av Braga inniheldur tilfar sum t.d.:

- Grein um skaldskapin hjá Williami Heinesen. Malan Marnersdóttir skrivar;
- Samrøðu við Jóanes Nielsen um yrkjaravirksemið; Oddfríður Rasmussen skrivar;
- Samrøðu við Hansinu Iversen um hennara uppfatan av myndlistini í Føroyum og uttanlands. Kinna Poulsen skrivar;
- Ummæli av nýggjastu bókunum hjá Tóroddi Poulsen, Jóanesi Nielsen og Jens Paula Heinesen o.o.
- Fastir teigar sum t.d. *Bókin kring heimin,* sum hesaferð hyggja nærri at bókmentarákunum í Svøríki og Noregi.

Bragi hevur ikki peningaligan vinning í hyggju og er óheft politiskt og átrúnaðarliga.

Bragi er 64 síður til støddar og er í litum. Tað kostar 76 kr. í leysasølu, og 65 kr. eintakið hjá haldarum. Tað ber til at tekna seg sum haldara á heimasíðuni www.bragi.dk, ella við at senda eitt t-bræv til: bragi@mail.tele.dk

# Bridgeferð við Norrönu

Fríggjamorgunum 26. mai skipar Smyril-Line fyri bridgeferð við Norrønu. Hetta er eitt afturvendandi tiltak sum skipað verður fyri á hvørjum ári. Umborð á Norrønu skipar Per Kallsberg fyr ymiskum bridgekappingum. Spælararnir, sum hava verið við undanfarin ár lata væl at ferðini og enn eru pláss eftir til ferðina í ár. Øll, ið hava hug at spæla brigde kunnu tekna seg til Bridgeferðina. Tekning fer fram á Smyril-Line. Fyriskiparin biðjur fólk tekna seg skjótast gjørligt, soleiðis at hann veit hvørjar kappingar hann skal skipa fyri. Vinningar verða latnir til vinnandi pørini.

# Framsýning í Sørvági

*Hós- og fríggjadagin 25. og 26. mai, verður stór og fjølbreið framsýning á Flakavirkinum í Sørvági*

Hósdagin og fríggjadagin 25. og 26. mai skipar Kjølbro Heilsøla fyri stórari framsýning í matstovuni á flakavirkinum í Sørvági. Frá tí at heilsølan byrjaði sítt virksemi, hevur tað verið heilt nattúrligt at bjóða fiskiflotanum alla ta vøru og útgerð, sum hoyrir skipum til. Hetta hevur so ført við sær, at Kjølbro Heilsøla er blivin ein leiðandi heilsøla, tá tað snýr seg um fiskiflotan.

Á framsýningini, sum er meira ætla sjófólki, útgerðafeløgum, virkjum og handlum, verður nógv at síggja. Av tí at Kjølbro í 99 fekk umboð uppá ta heimskendu oljuna TEXACO, verða sjálvandi vørur frá Texaco at síggja á hesari framsýning. Kjølbro fekk eisini fyrst í 2000, umboð uppá 66 N. Hetta er eitt vælkent íslenskt merki, sum selur oljuklæðir, dressir, arbeiðsklæðir, trygdarskógvar og nógv nógv annað. So 66 N verður eisini at síggja á framsýningini.

Umframt olju og klæðir til vinnulívið, kemur Kjølbro eisini at vísa fram knívar frá Frost, húkar frá Mustad, styvlar frá Bekina og nógv nógv annað. Í stuttum tíðindaskrivi frá Kjølbro verður sagt, at opið er báðar dagarnar frá kl. 17 til 21 og at øll eru vælkomin.



# Arbeiðið við barnsburðargrunninum steðgað

*Nevnin, ið skuldi fyrireika ein almennan barnsburðargrunn, hevur fyribils lagt frá sær. Orsøkin er, at limirnir ikki fáa samsýning fyri arbeiðið*



*Ætlanin var, at barnsburðargrunnurin skuldi setast á stovn í ár, men nú er arbeðið steðgað, tí limirnir í arbeiðsbólinum ikki fáa samsýning*

John Johannessen

Tey, sum umboðaðu fakfeløgini í arbeiðsbólkinum, ið skuldi fyrireika ein almennan barnsburðargrunn hava lagt hetta arbeiði á hillina. Orsøkin er, at tey onga samsýning fáa frá almennu myndugleikunum fyri tað, tey gera.

Ætlanin var, at arbeiðsbólkurin skuldi vera liðugur við arbeiði sítt áðrenn summarfrítíðina, soleiðis, at grunnurin kundi setast á stovn í ár. Men hetta verður helst ikki veruleiki.

Kortini eru fólk tó ikki heilt givin at fyrireika barnsburðargrunnin. Tí enn arbeiða embætisfólk í Vinnumálastýrinum við hesi ætlan. Men landsstýrismaðurin í vinnu- og arbeiðsmarknaðarmálum, Finnbogi Arge, vísir á, at Vinnumálastýrið hevur avmarkaðar kreftir. Tí kann ikki væntast, at arbeiðið fer at ganga eins skjótt fyri seg, sum tað hevði gjørt, um arbeiðsbólkurin var virkin.

### Fíggjarmálastýrið skal gjalda

Hóast tað er landsstýrismaðurin í vinnu- og arbeiðsmarknaðarmálum, ið hevur ábyrgdina av arbeiðinum við at seta á stovn ein almennan barnsburðargrunn, er tað Fíggjarmálastýrið, ið ger av, um arbeiðsbólkurin skal fáa samsýning ella ikki. Somuleiðis er tað Fíggjarmálastýrið, ið skal rinda hesa samsýning.

Men Fíggjarmálastýrið heldur ikki, at tey, sum umboða fakfeløgini í arbeiðsbólkinum, eiga at fáa samsýning fyri arbeiðið.

Fíggjarmálastýrið metir, at umboðini eiga at gera arbeiðið av náttúrligum áhuga. Grundgevingin fyri hesum er, at grunnurin nevniliga kemur limunum í fakfeløgunum til góða.

Landsstýrismaðurin í vinnu- og arbeiðsmarknaðarmálum, Finnbogi Arge, hevur roynt at fingið Fíggjarmálastýrið til at rinda arbeiðsbólkinum samsýning, men hann hevur fingið at vita, at talan er um eitt prinsippmál.

### Skilir Fíggjarmálastýrið

Hóast Finnbogi Arge hevur roynt at fingið Fíggjarmálastýrið til at rinda samsýning til arbeiðsbólkin, er hann samdur við Fíggjarmálastýrinum. Hann vísir á, at tá limirnir í arbeiðsbólkinum umboða ein ávísan áhugabólk, ið fær ágóða av arbeiðinum, gjørt verður í arbeiðsbólkinum, er tað heldur áhugabólkurin, ið eigur at rinda limunum samsýning.

Finnbogi Arge ger annars greitt, at hann heldur tað vera stóra skomm, at arbeiðið við almenna barnsburðargrunninum skuldi steðga upp av slíkari óneyðugari orsøk.

Kvinnufelagssamskipanin harmaðist eisini í bløðunum herfyri, um at arbeiðið at seta á stovn barnsburðargrunnin er steðgað.

At hendan samgongan skuldi seta á stovn almennan barnsburðargrunn er staðfest í samgonguskjalinum.

# Uttanríkisráðharrin til Føroya á fund

*Mánadagin kemur danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen, til Føroya at vitja. Hann skal millum annað hava fund við løgmann, landsstýrið og uttanlandsnevndina*



*Niels Helveg Petersen, uttanríkisharri, kemur á vitjan*

John Johannessen

Eftir ætlan kemur danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen, til Føroya á arbeiðsvitjan mánadagin og fer avstað aftur mikudagin.

Uttanríkisráðharrin skal á ferðini millum annað á fund við løgmann, landsstýrið og uttanlandsnevnd løgtingsins. Á hesum fundum skulu partarnir viðgera ymisk uttanlandsmál. Hugsast kann, at nýggi fríhandilssáttmálin við Russland verður viðgjørdur, somuleiðis sum ES, WTO og NATO eisini verða á skránni.

Tað er vanligt, at danski uttanríkisráðharrin viljar í Føroyum eina ferð um árið. Av løgmansskrivstovuni siga tey, at fundirnir millum uttanríkisráðharran og landsstýrið vanliga geva nakað fyri báðar parar.

Á fundunum er nevniliga vanligt, at uttanríkisráðharrin, eins væl og landsstýrið, kunnar um tey mál, hann í løtuni tekst við, somuleiðis, sum ymsir trupulleikar viðvíkjandi uttanlandsmálum verða viðgjørdir.

Tað er Ríkisumboðið, ið leggur ferðina hjá Niels Helveg Petersen í Føroyum til rættis. Hagani siga tey, at skráin fyri ferðina enn ikki er heilt liðug. Orsøkin til hetta er, at fólkatingið hevur longt tingsetuna, og tí er ikki heilt greitt, um uttanríkisráðharrin júst kemur mánadagin ella hann verður nakrar dagar seinkaður.

ADIDAS Samba skógvar til børn
bláir/hvítir
fyrr 299,- NÚ 199,-

Renniskógvar
fyrr upp til 599,- NÚ 200,-

ADIDAS Samba skógvar til vaksin
bláir/hvítir
fyrr 399,- NÚ 299,-

ADIDAS Canvas skógvar
fyrr upp til 499,- NÚ 200,-

ADIDAS jakkar til børn
fyrr 599,- NÚ 399,-

NIKE skógvar til børn
fyrr upp til 399,- NÚ 150,-

Renniskógvar
fyrr upp til 799,- NÚ 300,-

og mong onnur góð tilboð

Sosialurin - 311820

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR • N. Finsensgøta 5 • Postsmoga 268 • 110 Tórshavn
Tel. 31 14 03 • E-mail: sporthd@post.olivant.fo